# ÁRSFRÁGREIÐING 2020

www.als.fo



ALS

# INNIHALD

**ÁTEKNINGAR**

Leiðsluátekning 2

Grannskoðanarátekning frá óheftum grannskoðara 3

**LEIÐSLUFRÁGREIÐING**

Upplýsingar um grunnin 8

Høvuðs og lyklatøl 9

Leiðslufrágreiðing 10

**ÁRSROKNSKAPUR**

Nýttur roknskaparháttur 44

Rakstrarroknskapur 1. januar - 31. desember 2020 47

Fíggjarstøða tann 31. desember 2020 48

Peningastreymsuppgerð 1. januar - 31. desember 2020 50

Notur til ársfrásøgnina 52

**ALS - Ársfrágreiðing 2020**

**Myndir**: ALS, Sansir.

**Sniðgeving og uppseting**: Sansir
**Prent**: Føroyaprent

# Leiðsluátekning

Stýrið og stjórnin hava í dag viðgjørt og góðkent ársfrásøgnina fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2020 fyri ALS.

Ársfrásøgnin er greidd úr hondum í samsvari við ársroknskaparlógina.

Vit meta, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðu grunsins tann 31. desember 2020 umframt av grunsins virksemi og peningastreymi grunsins fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2020.

Vit meta, at leiðslufrágreiðingin inniheldur eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.

Ársfrásøgnin verður løgd fram til góðkenningar fundsins.

Tórshavn, tann 12. mai 2021

**Stjórn**

Magni á Deild Olsen
stjóri

Eyðfinnur Jacobsen
formaður

Magnus Pauli Glerfoss

Georg F. Hansen

Stefan í Skorini

Jan Mortensen

Marita Rasmussen

Óluva í Gong



# Grannskoðanarátekning frá óheftum grannskoðara

## Til leiðsluna í Arbeiðsloysisskipanini

**Grannskoðanarátekning á ársroknskapin**

### Niðurstøða

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá ALS fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2020 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum. Ársroknskapurin er gjørdur eftir ársroknskaparlógini við teimum tillagingum, sum eru lýstar undir nýttum roknskaparhátti.

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av grunsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu tann 31. desember og úrslitinum av virkseminum hjá ALS í roknskaparárinum 1. januar - 31. desember 2020 samsvarandi ársroknskaparlógini við teimum tillagingum, sum eru lýstar undir nýttum roknskaparhátti.

### Grundarlag fyri niðurstøðuni

Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og eftir øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum. Okkara ábyrgd sambært hesum standardum og krøvum er nærri lýst í grannskoðanarátekningini í pettinum "Ábyrgd grannskoðarans av grannskoðanini av ársroknskapinum". Vit eru óheft av grunninum samsvarandi altjóða etisku reglunum fyri grannskoðarar (etisku reglurnar hjá IESBA) og øðrum ásetingum, ið eru galdandi í Føroyum, eins og vit hava lokið onnur etisk krøv, sum vit hava sambært hesum reglum og krøvum. Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

### Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til fyri at gera ársroknskapin uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá ið ársroknskapurin verður gjørdur, hevur leiðslan ábyrgdina av at meta um, hvørt grunnurin megnar at halda áfram við rakstrinum, og har tað er viðkomandi at upplýsa um viðurskifti viðvíkjandi framhaldandi rakstri og at gera ein ársroknskap eftir roknskaparásetingunum um framhaldandi rakstur, uttan so at leiðslan hevur ætlanir um at avtaka grunnin, steðga rakstrinum ella um leiðslan í roynd og veru ikki hevur aðrar møguleikar.

# Grannskoðanarátekning frá óheftum grannskoðara

**Ábyrgd grannskoðarans av grannskoðanini av ársroknskapinum**

Endamál okkara er at fáa eina grundaða vissu fyri, at ársroknskapurin sum heild er uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, og at gera eina grannskoðanarátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissa er vissa á høgum stigi, men er tó ikki ein trygd fyri, at grannskoðan framd samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, um slíkir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað sviki ella mistøkum og mugu metast at verða týðandi, um tað er sannlíkt, at teir hvør sær ella saman kunnu metast at hava ávirkan á fíggjarligu avgerðirnar, ið roknskaparbrúkararnir taka við støði í ársroknskapinum.

Tá ið vit grannskoða samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum í føroysku grannskoðaralógini, gera vit yrkisligar metingar og varðveita professionella ivasemið undir grannskoðanini.

Harumframt:

- Eyðmerkja og meta vit um váðan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og grannskoða samsvarandi hesum váða og fáa til vega grannskoðanarprógv, ið eru nóg góð og egnað sum grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri, at vit ikki avdúka týðandi feilir orsakað av sviki, er størri enn váðin fyri, at feilir orsakað av mistøkum ikki verða avdúkaðir, av tí at svik kann umfata samansvørjing, skjalafalsan, tilætlaðari dyljan, villleiðing ella at innanhýsis eftirlit verða skúgvað til viks.

- Fáa vit fatan av tí innanhýsis eftirliti, ið er viðkomandi fyri grannskoðanina, soleiðis at vit kunnu leggja grannskoðanina til rættis á nøktandi hátt eftir umstøðunum, men ikki fyri at gera eina niðurstøðu um, hvussu virkið innanhýsis eftirlitið er.

- Taka vit støðu til, um tann av leiðsluni nýtti roknskaparháttur er hóskandi, eins og vit meta um, hvørt roknskaparligu metingarnar og tilhoyrandi upplýsingar frá leiðsluni eru rímiligar.

- Taka vit støðu til, um tað er hóskandi, at leiðslan hevur valt at gera ársroknskapin grundað á roknskaparháttin um framhaldandi rakstur, og um tað, við støði í teimum grannskoðanarprógvum, ið eru fingin til vega, er týðandi óvissa ella viðurskifti, ið kunnu elva til týðandi óvissu um, hvørt grunnurin megnar at halda áfram. Er niðurstøðan, at tað er týðandi óvissa, skulu vit gera vart við hetta í grannskoðanarátekningini við at vísa til upplýsingar hesum viðvíkjandi í ársroknskapinum ella, um hesar upplýsingar ikki eru nøktandi, tillaga okkara niðurstøðu. Okkara niðurstøður eru grundaðar á tey grannskoðanarprógv, ið eru fingin til vega fram til dagin, tá ið okkara grannskoðanarátekning verður undirskrivað. Hendingar í framtíðini ella viðurskifti kunnu tó elva til, at grunnurin ikki er førur fyri at halda áfram við rakstrinum.

- Taka vit støðu til samlaðu framløguna, bygnaðin og innihaldið í ársroknskapinum, íroknað upplýsingarnar í notunum umframt um ársroknskapurin vísir transaktiónir, sum liggja undir, og hendingar á ein slíkan hátt, at tað gevur eina rættvísandi mynd.



# Grannskoðanarátekning frá óheftum grannskoðara

Vit samskifta við leiðsluna um millum annað vavið á ætlaðu grannskoðanini og nær vit vænta at grannskoða. Harumframt samskifta vit um týðandi eygleiðingar í sambandi við grannskoðanina, so sum týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, ið vit eru komin fram á í sambandi við grannskoðanina.

**Ummæli av leiðslufrágreiðingini**

Leiðslan hevur ábyrgdina av leiðslufrágreiðingini.

Okkara niðurstøða um ársroknskapin fevnir ikki um leiðslufrágreiðingina, og vit geva ikki nakra váttan við vissu um leiðslufrágreiðingina.

Tað er okkara ábyrgd, í sambandi við grannskoðanina av ársroknskapinum, at lesa leiðslufrágreiðingina og í hesum sambandi meta um, hvørt samanhangur er millum leiðslufrágreiðingina og ársroknskapin, ella um hon er í mótsøgn við ta vitan, ið vit hava fingið undir grannskoðanini, ella á annan hátt er tengd at týðandi skeivleikum.

Okkara ábyrgd er harumframt at hugsa um hvørt leiðslufrágreiðingin hevur kravdu upplýsingarnar samsvarandi ársroknskaparlógini.

Grundað á gjørda arbeiðið er tað okkara fatan, at leiðslufrágreiðingin samsvarar við ársroknskapin, og at hon er gjørd samsvarandi krøvunum í ársroknskaparlógini. Vit eru ikki vorðin varug við týðandi feilir í leiðslufrágreiðingini.

Tórshavn, hin 12. mai 2021

SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f



Jóhannes Færø
statsaut. revisor

# Upplýsingar um grunnin

## GRUNNURIN

**ALS**
Tinghúsvegur 14
100 Tórshavn
Telefon: 349550
Heimasíða: www.als.fo

Roknskaparár: 1. januar - 31. desember

## STÝRIÐ

Eyðfinnur Jacobsen, formaður
Georg F. Hansen
Stefan í Skorini
Magnus Pauli Glerfoss
Marita Rasmussen
Óluva í Gong
Jan Mortensen

## STJÓRN

Magni á Deild Olsen, stjóri

## GRANNSKOÐAN

SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f
Staravegur 17
100 Tórshavn



# Høvuðs- og lyklatøl

Gongdin hjá grunninum seinastu 5 árini kann lýsast við hesum høvuðs og lyklatølum:

| | **2020** tkr. | **2019** tkr. | **2018** tkr. | **2017** tkr. | **2016** tkr. |
|---|---|---|---|---|---|
| **Høvuðstøl** | | | | | |
| Inngjøld | 253.155 | 245.151 | 231.859 | 220.898 | 210.145 |
| Bruttoúrslit | 42.800 | 189.510 | 155.577 | 130.854 | 98.887 |
| Úrslit áðrenn fíggjarpostar | 25.969 | 174.940 | 140.553 | 115.297 | 83.776 |
| Úrslit frá fíggjarpostum | 12.105 | 26.065 | 8.324 | 10.333 | 11.309 |
| Nettosøla | 253.155 | 245.151 | 231.859 | 220.898 | 210.145 |
| **Fíggjarstøða** | | | | | |
| Fíggjarstøðujavni | 959.008 | 916.652 | 717.169 | 586.711 | 463.732 |
| Íløgur í materiella støðisogn | -75 | -1.164 | -1.434 | -6.460 | 0 |
| Eginogn | 948.052 | 910.968 | 711.274 | 579.996 | 455.359 |
| **Peningastreymur frá:** | | | | | |
| - rakstrarvirksemi | 42.080 | 198.972 | 130.722 | 122.616 | 94.908 |
| Starvsfólkatal | 27 | 29 | 33 | 35 | 34 |
| **Lyklatøl** | | | | | |
| Høvuðsavkast | 2,8% | 21,4% | 21,6% | 22,0% | 20,1% |
| Tryggleikastig | 98,9% | 99,4% | 99,2% | 98,9% | 98,2% |
| Eginpeningsavkast | 4,0% | 24,6% | 20,3% | 24,1% | 23,0% |

# LEIÐSLU-FRÁGREIÐING **2020**

## Árið byrjaði væl – sum undanfarna ár hevði verið, og sum undanfarna ár endaði.

Arbeiðsloysið var lágt – bara stívliga 1% - virksemið var nógv, og tørvurin á skikkaðari arbeiðsmegi var framvegis stórur.

Á grækarismessu - hósdagin 12. mars 2020 – kom hvøkkur í alt føroyska samfelagið, tá Bárður á Steig Nielsen, løgmaður, kunngjørdi, at føroyska samfelagið skuldi niður í ferð orsakað av vandunum við korona-smittuni, sum var komin til Føroyar.

Til tess at tálma og basa korona-smittuni høvdu myndugleikarnir tá nøkur tilmæli til Føroya fólk, sum millum annað vóru, at:

- Fólk ikki ferðaðust í onnur lond uttan so, at tað var hægst neyðugt
- Skúlanæmingar skuldu ikki møta í skúla
- Øll starvsfólk á almenna arbeiðsmarknaðinum skuldu arbeiða heimanífrá, tó undantikin tey, sum røktu mest viðbreknu samfelagsuppgávurnar.
- Tiltøk, har fleiri enn 100 fólk savnaðust, vóru útsett ella avlýst.

Hesi tiltøkini, sum myndugleikarnir settu í verk, vóru seinni longd, og ikki fyrr enn einar fimm vikur seinni var latið spakuliga upp aftur, og heldur meiri ferð kom á samfelagshjólini og partar av føroyska búskapinum.

Avleiðingarnar av korona-smittuni vístu seg skjótt, og tær skuldu vísa seg at verða álvarsamar.

Longu dagin eftir at løgmaður hevði kunngjørt, at Føroyar fóru niður í ferð, gjørdi Føroya Arbeiðsgevarafelag vart við, at skuldi sleppast undan hópuppsagnum hjá føroyskum arbeiðsgevarum, so var neyðugt alt fyri eitt at seta ein hjálparpakka í gildi, sum tryggjaði starvsfólkum á privata arbeiðsmarknaðinum okkurt slag av lønarískoyti.

Tað var skjótt greitt, at tað fór at verða Arbeiðsloysisskipanin, sum skuldi fáa í lag og standa fyri fyrsta hjálparpakkanum til føroyska arbeiðsmarknaðin, og longu leygardagin 14. mars var leiðslan á ALS saman við stýrisformanninum á fundi við Umhvørvis- og Vinnumálaráðið at tosa um, hvussu ein slíkur hjálparpakki kundi verið skipaður. Longu seinni sama kvøld vóru fyrstu uppskotini til broytingar í lógum og kunngerðum klár.

Stýrið fyri ALS hittist dagin eftir, tá samtykt varð, at Arbeiðsloysisskipanin eftir áheitan landsstýrisins vildi standa fyri og fíggja hjálparpakka 1.

Tað var greitt, at tað vóru einir 16-17 tús. løntakarar á privata arbeiðsmarknaðinum, men tað var eingin, ið visti hvussu nógvir av hesum fóru at fáa lønarískoyti úr hesum fyrsta hjálparpakkanum.

Tað var mett, at talið kundi fara at verða um einar 4-5 tús. løntakarar, og at hjálparpakkin kundi fara at kosta ALS á leið 60 til 90 mió. krónur um mánaðin fram til 30. juni, tá sólseturdagurin fyri hesa lógina var settur at vera. Samanlagt einar 200 til 300 mió. krónur.

Mett var, at ALS-grunnurin – eftir fleiri ár við lágum arbeiðsloysi - var so mikið væl fyri fíggjarliga, at hann megnaði at lofta fíggjarligu avbjóðingunum við hesi serligu korona-skipanini. Og so hevði grunnurin eisini drúgvar royndir og hóskandi undirstøðikervi at sita fyri slíkari serskipan.

Seinni hendan sama sunnudagin 15. mars almannakunngjørdi landsstýrið hjálparpakkan.

Á ALS hildu fyrireikingarnar til hjálparpakka 1 fram. Mikudagin 18. mars vóru lógarbroytingarnar lýstar, og mánadagin 23. mars – bara 11 dagar eftir at løgmaður hevði kunngjørt, at Føroyar skuldu niður í ferð - var klárt at taka ímóti fyrstu tilmeldingunum til hesa serligu koronaskipanina.

Arbeiðsloysið
við árslok 2020

**1,3%**

2019: 0,9%

Tað gingu bara nakrir heilt fáir dagar, so hevði ALS fingið oman fyri 3.000 umsóknir um lønarískoyti. Fleiri umsóknir komu, sum dagarnir gingu, og tað stóð á hjá starvsfólkunum hjá ALS at viðgera og játta allar umsóknirnar, og tey arbeiddu mest sum bæði nátt og dag í fleiri mánaðir at tryggja løntakarum á privata arbeiðsmarknaðinum lønarískoyti.

Longu 30. mars fingu tey fyrstu stívliga 1.600 fólkini lønarískoyti, og bert eina viku seinni rindaði ALS aftur lønarískoyti út. Hesaferð fingu sløk 3.000 fólk lønarískoyti. Tá talið av fólki, sum vóru í lønarískoytisskipanini, var í hæddini, vóru tað 4.354 fólk, og samlaða útgjaldið var oman fyri 50 mió. krónur um mánaðin.

Tá skipanin endaði, høvdu næstan 4.800 ymiskir persónar verið í skipanini.

Skipanin hevði eina sokallaða sólsetursdagfesting, sum merkti, at lógarbroytingarnar og harvið hjálparpakki 1 fór úr gildi tann 30. juni 2020.

Tá á leið ein mánaður var eftir, til skipanin skuldi fara úr gildi, vóru stig tikin til at leingja hjálparpakka 1, og hann var longdur fram til 30. august 2020.

Fram til 30. juni rindaði ALS allan kostnaðin av hjálparpakkanum, men tá skipanin var longd, átók landið sær at rinda tann partin.

Samanlagt var kostnaðurin av hesum hjálparpakkanum 147,75 mió. krónur. Parturin, ið ALS rindaði, var 128,5 mió. krónur, meðan parturin, sum landið rindaði, varð 19,3 mió. krónur.

Hóast ALS við hesi skipanini fekk eina óvæntaða útreiðslu á 128,5 mió. krónur, so gjørdist ársúrslitið kortini eitt avlop á 37,1 mió. krónur.

Tíðina eftir at løgmaður á grækarismessu hevði kunngjørt tilmælini hjá myndugleikunum, vaks arbeiðsloysið nakað. Fyrstu tveir mánaðirnar av árinum var arbeiðsloysið á leið 1,2%, men eftir 12. mars og fram til juli mánað vaks arbeiðsloysið upp í 1,8% og minkaði so aftur, tað ið eftir var av árinum.

Við árslok var arbeiðsloysið komið niður aftur á 1,3%. Hóast arbeiðsloysið vaks nakað, meðan korona-farsóttin herjaði, so vísti tað seg, at óttin fyri, at arbeiðsloysið fór at vaksa nógv, tá korona-skipanin endaði, var ógrundaður. Tað vísti seg nevniliga, at tað var stórt sæð ongin av teimum stívliga 600 fólkunum, sum vóru í korona-skipanini, tá hon endaði, sum flutti beinleiðis yvir í vanligu arbeiðsloysisskipanina. **Sí mynd 01.**

**Mynd 01** / Tal av persónum í serligu korona-skipanini








## Fólkatalið veksur

Fólkatalið í Føroyum helt á at vaksa í 2020. Við ársbyrjan búðu 52.222 fólk í Føroyum, og við árslok var talið komið upp á 52.934. Ein vøkstur á 712 fólk.

Tað er gleðiligt, at fleiri fólk flyta til landið, tí tørvur er á teirra arbeiðsmegi. Hóast korona-farsóttin hevur ávirkað virksemið í landinum og eisini marknaðirnar, hagar føroyskar fyritøkur útflyta sína framleiðslu, so var kortini nógv virksemi, og tað eru vinnugreinar, har tørvur var – og enn er – á skikkaðari arbeiðsmegi.

Sum fólkatalið veksur, veksur eisini arbeiðsfjøldin, og fleiri fólk eru til arbeiðis, og lønarútgjaldingarnar vaksa. Áhaldandi jaliga gongdin við nógvum virksemi og lágum arbeiðsloysi sæst aftur í fíggjarviðurskiftunum hjá Arbeiðsloysisskipanini, og fíggjarliga royndist 2020 hóast alt væl.

Orsakað av korona-farsóttini var stórur vøkstur í útgjøldunum hjá Arbeiðsloysisskipanini, og tí var stór afturgongd í úrslitinum, men hóast tað, so gjørdist ársúrslitið eitt avlop á 37,1 mió. krónur.

Við úrslitinum fyri 2020 var eginognin við árslok 948 mió. krónur, sum er tað mesta nakrantíð, og við hesi eginognini megnar ALS at standa ímóti einum arbeiðsloysi á 8% í á leið 5 ár, áðrenn skipanin verður insolvent. Arbeiðsloysið hevur ikki verið 8% síðani 1997 stutt eftir stóru kreppuna, sum tá var.

Stýrið og stjórn fegnast um, at úrslitið í 2020 hóast alt gjørdist so mikið gott, og at Arbeiðsloysisskipanin var før fyri at átaka sær fyrisitingina og fíggingina av hjálparpakka 1. Hetta staðfestir týdningin av, at skipanin hevur neyðuga fíggjarliga máttin at standa ímóti við, tá tíðirnar eru minni góðar, og samfelagið fær slík bakkøst, sum tað fekk í 2020.

Stýrið fyri ALS hevur sett sær sum mál, at Arbeiðsloysisskipanin skal javnviga fíggjarliga, tá arbeiðsloysið er millum 4,25% og 4,50%. Hetta merkið hevur støði í søguliga arbeiðsloysinum og merkir, at tá arbeiðsloysið er niðanfyri 4,25 til 4,5%, skal skipanin hava avlop, meðan hon kann hava hall, tá arbeiðsloysið fer upp um 4,5%.

So hvørt sum virksemið í Føroyum er vaksið, talið av løntakarum er hækkað, eins og samlaðu lønargjaldingarnar eru hækkaðar, so er markið fyri, nær arbeiðsloysið verður so høgt, at raksturin hjá ALS gevur hall, eisini hækkað. Men við lógarbroytingum, sum vóru samtyktar í Løgtinginum 10. desember í 2020, og sum fingu virkna frá ársskiftinum, eru fyritreytirnar broyttar nakað soleiðis, at um arbeiðsloysið fer upp um 4%, so gevur raksturin hall.

Hetta markið er nakað lægri, enn tað hevur verið undanfarin ár, men tá søguliga arbeiðsloysið seinastu 23 árini hevur verið avmarkað til 3,5% verður hetta mett at vera nøktandi.

*Hjálparpakkin kostaði samanlagt 147,75 mió. krónur. Av hesum rindaði ALS 128,5 mió. krónur (87%), meðan landið rindaði 19,3 mió. krónur (13%)*

# Arbeiðsloysið enn lágt

Í januar og februar mánaði í 2011 var arbeiðsloysið tað hægsta í nýggjari tíð. Tá var tað 7,4%. Síðani er tað støðugt lækkað, og við árslok í 2020 var arbeiðsloysið komið niður á 1,3%.

Lægsta arbeiðsloysið, sum nakrantíð er skrásett í Føroyum yvirhøvur, var mánaðirnar september til desember í 2019, tá arbeiðsloysið var 0,9%.

Tá vóru bara samanlagt stívliga 300 fólk í Føroyum rakt av arbeiðsloysi.

Síðani er arbeiðsloysið kvinkað uppeftir og var, sum nevnt, 1,3% við árslok í 2020.

Tað vóru í miðal 322 fólk, sum fingu arbeiðsloysisstuðul hvørja ferð, arbeiðsloysisstuðul varð útgoldin í 2020. Í 2019 vóru tað í miðal 201 fólk, sum fingu arbeiðsloysisstuðul hvørt útgjaldsskeið.

Afturat hesum 322 fólkunum koma tey, sum fingu forsorg vegna arbeiðsloysi frá Almannaverkinum. Tey eru eisini partur av arbeiðsloysinum í Føroyum.

Í miðal fyri alt 2019 vóru 329 fólk fulltíðararbeiðsleys, sum svarar til 1,1%. Í 2020 var talið av fulltíðararbeiðsleysum 444, sum svarar til 1,5%. **Sí mynd 02.**

**Mynd 02** / Arbeiðsleys í % av arbeiðsfjøldini - ársmiðal




# Gongdin í 2020

So við og við sum arbeiðsloysið minkar, gerast sveiggini í arbeiðsloysinum gjøgnum árið eisini minni. Í 2018 sveiggjaði arbeiðsloysið millum 2,4% við ársbyrjan og 1,2%, tá tað var lægst í oktober og november mánaði tað árið. Í 2019 var arbeiðsloysið enn støðugari og lækkaði úr 1,3% við ársbyrjan niður í 0,9% við árslok. Í 2020 var arbeiðsloysið 0,9% við ársbyrjan. Tað hækkaði so upp á 1,8%, meðan korona var í hæddini og minkaði so aftur niður í 1,3% við árslok. Nakað størri sveiggj enn undanfarin ár orsakað av korona-farsóttini. **Sí mynd 03.**

**Mynd 03** / Arbeiðsloysið 2019 og 2020









# Fleiri komu í skipanina

Fyri fyrstu ferð í 10 ár komu fleiri fólk í Arbeiðsloysisskipanina, enn tað fóru úr skipanini.

Tað var ikki óvæntað, tí arbeiðsloysið kvinkaði nakað uppeftir serliga orsakað av korona-farsóttini.

Tað komu samanlagt 1.094 nýggj fólki í ALS í 2020, meðan 953 fólk fóru úr skipanini.

Av hesum eru nøkur, sum hava verið arbeiðsleys í fleiri umførum. **Sí mynd 04.**

**Mynd 04** / Tal av fólkum komin í og farin úr Arbeiðsloysisskipanini



# Føroyar hava lægsta arbeiðsloysið

Sætta árið á rað var arbeiðsloysið í Føroyum við árslok í 2019 tað lægsta yvirhøvur samanborið við onnur lond í Evropa.

Arbeiðsloysið í serliga Íslandi hevur verið lágt seinastu tvey-trý árini, men í 2019 vaks arbeiðsloysið í Íslandi nógv, og tað eru nú fleiri lond í ES, har arbeiðsloysið er lægri enn í Íslandi.

Arbeiðsloysið í Føroyum var, sum áður nevnt, 0,9% við árslok í fjør, og í Kekkia var tað 1,9% við árslok í fjør, og er tað næstlægsta samanborið við Føroyar og londini í ES. **Sí mynd 05.**




**Mynd 05** / Arbeiðsloysið í londunum í Europa í desember mánaði 2020

# Fleiri løntakarar

Gongdin við minkandi arbeiðsloysi sæst aftur í talinum av løntakarum, sum hevur verið vaksandi seinastu tíggju árini.

Ikki óvæntað er eitt ávíst samsveiggj millum arbeiðsloysið og talið av løntakarum soleiðis, at tá talið av løntakarum veksur, so minkar arbeiðsloysið.

Tað er eisini eitt øvugt samsveiggj millum arbeiðsloysið og nettoflyting soleiðis, at tá arbeiðsloysið minkar, vísir tað seg, at nettoflytingin til Føroyar veksur – og øvugt.

Við árslok í 2020 vóru tað 27.718 løntakarar í Føroyum. Hetta eru 351 løntakarar fleiri enn eitt ár frammanundan, og er hetta sannlíkt tað mesta, sum yvirhøvur er skrásett í Føroyum nakrantíð. **Sí mynd 06 og 07.**

**Mynd 06** / Samsveiggj millum arbeiðsloysi og nettotilflyting




**Mynd 07** / Tal av løntakarum og tal av arbeiðsleysum 2010 til februar 2021



## Lønargjaldingarnar hækka

Hóast korona-farsóttina og avleiðingarnar av henni, hækkaðu samlaðu lønargjaldingarnar í 2020 ellivta árið á rað. Tá árið var úti, vóru 10,27 mia. krónur goldnar út í lønum.

Samanborið við árið frammanundan var talan um ein vøkstur á 207 mió. krónur, sum svaraði til 2,1%.

Vøksturin var tó minni enn ein triðing samanborið við tað, hann var frá 2018 til 2019, og tað eru sjey ár síðani, vøksturin var minni enn tað, hann var í 2020.

Vøksturin tykist halda fram í 2021, tí í fyrsta ársfjórðingi í 2021 vóru 19,5 mió. krónur meiri goldnar út í lønum samanborið við sama tíðarskeið í 2020. Í mars mánaði í 2021 vóru 925,3 mió. krónur goldnar út í lønum, og tað er tað mesta, sum nakrantíð er skrásett í Føroyum ein einstakan mánað.

Hugsandi er, at korona-farsóttin ikki hevur rakt Føroyar so hart, sum hon hevur rakt nógv onnur lond, og sannlíkt hevur serliga lønarískoytisskipanin hjá ALS gjørt, at ikki so nógv fólk vórðu søgd úr starvi, men enn er kortini ov tíðliga at siga, hvørjar langtíðar avleiðingarnar av korona-farsóttini verða.




*Hugsandi er, at korona-farsóttin ikki hevur rakt Føroyar so hart, sum hon hevur rakt nógv onnur lond*

## Fólk steðga styttri hjá ALS

Árini frá 2009 til 2013 vístu, at fólk, sum einki arbeiði høvdu, vóru alsamt longri arbeiðsleys. Tey fólkini, sum fóru úr skipanini í 2013, høvdu í miðal verið arbeiðsleys í 254 álmanakkadagar – stívliga átta mánaðir.

Tann gongdin vendi í 2014, tá fólk fyri fyrstu ferð í fimm ár vóru styttri arbeiðsleys enn undanfarna ár, og henda gongdin hevur hildið fram í 2020.

Fólkini, sum fóru úr aftur ALS í 2014, høvdu í miðal steðgað 227 álmanakkadagar, meðan tey, sum fóru úr skipanini í 2020, steðgaðu í miðal í 116 álmanakkadagar hjá ALS. Hetta svarar til slakar fýra mánaðir. **Sí mynd 08.**

**Mynd 08** / Tal av døgum, fólk í miðal hava verið arbeiðsleys – bert tey, sum eru farin úr ALS




**Mynd 09** / Miðvirði (median) av øllum, sum eru farin úr skipanini síðani 2016



**Mynd 10** / Miðallongd á arbeiðsloysum (álmanakkadagar)




**Mynd 11** / Miðallongd á arbeiðsloysi fyri kvinnur og menn frá 2016 til 2020




**Mynd 12** / Miðallongd á arbeiðsloysi býtt á kyn og aldursbólkar 2020




Ein uppgerð yvir øll tey sløku 6.000 fólkini, sum hava verið í ALS síðani 1. januar 2016 og eru farin úr skipanini aftur, vísir, at miðvirði er 89 álmanakkadagar – slakir tríggir mánaðir. Tað merkir, at helvtin av øllum hesum fólkunum – neyvt 2.885 fólk – vóru farin úr skipanini aftur í seinasta lagi 89 dagar, eftir at tey komu í skipanina. Í miðal høvdu tey sløku 6.000 fólkini steðgað í 142 álmanakkadagar í skipanini. **Sí mynd 09.**

Verður hugt eftir, hvussu leingi tey fólkini, sum til eina og hvørja tíð eru í skipanini, hava verið arbeiðsleys, so er myndin í stóran mun tann sama.

Tað vísir seg, at tíðarskeiðini, fólk hava verið arbeiðsleys, eru vorðin alsamt styttri síðani á sumri í 2012, og yvirhøvur hava fólk, sum til eina og hvørja tíð eru í skipanini, verið nakað longri arbeiðsleys í miðal enn tey, sum eru farin úr skipanini.

Tey, sum vóru í skipanini við árslok í 2019, høvdu í miðal verið í ALS í 156 dagar, meðan tey, sum vóru í skipanini við árslok í 2020, høvdu í miðal verið í ALS í 149 dagar. Tey, sum vóru í skipanini í mars mánaði í 2020, høvdu í miðal verið arbeiðsleys í 174 dagar.

Tá tað eru so lutfalsliga fá fólk í Arbeiðsloysisskipanini, so er skjótt at miðaltølini broytast, men tað er eyðsæð jaligt, at fólk eru styttri arbeiðsleys. Tað er júst eitt av aðalmálunum hjá ALS, at fólk fara so skjótt aftur til arbeiðis ella undir útbúgving sum til ber.

Tað hevur eisini stóran búskaparligan týdning fyri ALS, at fólk steðga styttri, tí so verður minni rindað út í arbeiðsloysisstuðli.

Tølini eru miðaltøl fyri øll tey, sum hava verið í Arbeiðsloysisskipanini, og tað eru eyðsæð stórir munir á, hvussu leingi fólk steðga. Summi – serliga tey ungu – steðga stutt og fara skjótt aftur til arbeiðis ella at útbúgva seg, meðan tað er ein størri avbjóðing hjá teimum eldru at koma út aftur á arbeiðsmarknaðin.

Hagtølini vísa eisini, at yvirhøvur eru kvinnurnar longri arbeiðsleysar enn menn. Undantikið eru kvinnurnar í tjúgunum og tær, sum eru farnar um seksti ára aldur.

Tal av døgum, fólk í miðal hava verið arbeiðsleys

**116** dagar

2019: 127 dagar

Tað vísir seg eisini, tá hugt verður eftir øllum teimum sløku 6.000 fólkunum, sum eru farin úr skipanini síðani 1. januar 2016, at fyri stórt sæð allar aldrar vísir tað seg, kvinnur hava verið longri arbeiðsleysar enn menn á sama aldri.

Ikki óvæntað er ein rættiliga greiður samanhangur millum generella arbeiðsloysið í Føroyum og longdina á tíðini, fólk eru arbeiðsleys. Tá arbeiðsloysið – mátað sum fulltíðararbeiðsleys í % av samlaðu arbeiðarafjøldini – minkar, so eru fólk yvirhøvur styttri arbeiðsleys. Tað vil siga, at tað ganga færri dagar frá tí, fólk gerast arbeiðsleys, til tey fara úr Arbeiðsloysisskipanini aftur, og tá arbeiðsloysið hækkar, eru fólk longri arbeiðsleys. **Sí mynd 10, 11 og 12.**

## Færri detta út

Sambært reglunum ber til at vera í Arbeiðsloysisskipanini í 648 útgjaldsdagar í eitt fýra ára skeið.

Tað merkir, at tá ein persónur røkkur hesar 648 dagarnar, so kann viðkomandi ikki longur fáa arbeiðsloysisstuðul frá ALS og dettur tí úr skipanini.

Tey trý árini frá 2008 og fram til 2010 vóru tað í miðal á leið 20-30 fólk um árið, sum rukku fullum dagatali og duttu úr skipanini.

Í 2011 vaks arbeiðsloysið nógv, og talið av fólkum, sum duttu úr skipanini, vaks eisini munandi, og tey trý árini frá 2011 til 2013 var talið á fólkum, sum duttu úr skipanini, árliga millum 100 og 140.

Hóast talið enn var høgt í 2013, so vendi gongdin tá, og talið fór at minka.

Eitt aðalmál hjá ALS er, at helst skal eingin detta úr Arbeiðsloysisskipanini, tí tey hava brúkt allar 648 dagarnar, og tað er at fegnast um, at bara seks fólk duttu úr skipanini í 2019. Í 2020 var støðan heilt serligt, tí at samanteljingin av brúktum døgum var steðgað 12. mars, tá serliga koronaskipanin kom í gildið, og fram til 1. september 2020.

Hetta gjørdi, at tað var bara ein persónur, sum datt úr skipanini vegna fult dagatal í 2020. **Sí mynd 13.**

## Snýr seg framvegis um at fara fyrr aftur til arbeiðis

Hóast arbeiðsloysið framvegis er sera lágt, er tað greiða sannføringin, at týdningurin av at hava eitt arbeiði at fara til hvønn dag er ovurstórur hjá teimum allar flestu.

Tí verður dentur áhaldandi lagdur á at virka fyri, at fólk fara sum skjótast aftur til arbeiðis ella at útbúgva seg. Eisini fyri at tryggja, at føroyskir arbeiðsgevarar so skjótt og lætt sum til ber fáa starvsfólk við teimum førleikunum, teimum tørvar.

Arbeiðið at knýta tættari sambond við bæði arbeiðsgevarar og við viðskiftafólkini, sum einki arbeiði hava, hevur alstóran týdning, og stórur dentur verður lagdur á hendan partin.

Ymsu arbeiðsmarknaðarátøkini, sum ALS tekur stig til, og virksemið í Fjølsmiðjuni hava alstóran týdning í mun til at knýta sambond við viðskiftafólkini. Royndirnar seinastu árini hava verið góðar, og tær hava týðiliga víst, hvussu týdningarmikil hesin parturin av virkseminum er.

Lága arbeiðsloysið hevur við sær, at tað ber til at røkka størri part av hesum viðskiftafólkum og at røkka teimum fyrr. Í 2020 vóru tó serligar avbjóðingar, tí orsakað av smittuvandanum við korona bar ikki til í sama mun og á sama hátt sum áður at hitta viðskiftafólkini andlits til andlits, og tað bar illa til at hava vanliga virksemið í Fjølsmiðjuni.

**Mynd 13** / Tal av fólkum, sum eru dottin út vegna fult dagatal







*Endamálið við øllum virkseminum er at stuðla undir, at fólk fara fyrr aftur til arbeiðis, og at avmarka neiligu árinini, sum arbeiðsloysið hevur við sær*

Harafturat fór stórur partur av arbeiðsorkuni til at sita fyri serligu korona-skipanini, og tí var orkan at hitta viðskiftafólkini avmarkað í 2020.

Síðani smittuvandin er hasaður av, og tað er vorðið meiri vanligur gerandisdagur, er arbeiðið at hitta einstaka viðskiftafólkið í ávísan mun tikið uppaftur, og viðskiftafólk fáa nú aftur í boði at taka lut á ymsum skeiðum og førleikamenning. Eisini verður av øllum alvi roynt at stuðla viðskiftafólkum at koma sum skjótast aftur til arbeiðis.

Endamálið við øllum virkseminum er at stuðla undir, at fólk fara fyrr aftur til arbeiðis, og at avmarka neiligu árinini, sum arbeiðsloysið hevur við sær.

Í eldhuginum eftir at sleppa at gera mun hava vit á Arbeiðsloysisskipanini kortini altíð í huga, at tað eru menniskju, vit arbeiða saman við. Menniskju, sum eru komin í ta keðiligu støðu, at tey einki arbeiði hava. Tí eiga vit altíð at vera ansin og hava virðing fyri hesum menniskjum, og tað, vit taka stig til, má geva meining – bæði fyri tey og fyri okkum á ALS. Við tí virðingini í huga eru vit sannførd um, at ALS eigur og kann gera mun, og at vit eiga at hava ein virknan leiklut í at stuðla fólki í aftur at nærkast arbeiðsmarknaðinum.




*Á ALS verður áhaldandi arbeitt við at gagnnýta møguleikarnar við nýggjari tøkni, og millum annað verða mentar nýggjar tænastur, sum fara at verða tøkar á Vanganum*

## Kunningartøkni

Kunningartøkni er og verður ein alt meiri týðandi partur av gerandisdegnum, og tað eru fleiri ymiskar kt-skipanir, ið vera nýttar á ALS. Summar eru standardskipanir, meðan aðrar eru serligar skipanir, sum tað, hóast keyptar uttanífrá, er neyðugt at laga til, so tær standa mát við tørvin hjá ALS. Aftur aðrar eru so serligar, at neyðugt er at menna tær júst til ALS. Dømi um tað er fakskipanin, nevnd Smúffan, sum er ment innanhýsis av starvsfólki hjá ALS.

Hendan skipanin er skræddaraseymað til virksemið og tørvin hjá ALS. Hon varð tikin í nýtslu í desember mánaði í 2015, og royndirnar við Smúffuni hava verið góðar. Skipanin ger, at arbeiðið er lættari, skjótari og tryggari, og ein vinningur við Smúffuni er, at síðani hon varð tikin í nýtslu hevur borið til at flutt arbeiðsorku til onnur øki innanhýsis, har tørvurin hevur verið størri.

Á ALS verður áhaldandi arbeitt við at gagnnýta møguleikarnar við nýggjari tøkni, og nú talgildi samleikin hjá Talgildu Føroyum er tøkur, fer at bera til at talgilda fleiri tænastur og fleiri avgreiðslur. Verkætlan er farin av bakkastokki, hvørs endamál er at gera ymsar tænastur tøkar á Vanganum hjá Talgildu Føroyum.

Tað fyrsta, sum verður tókt á Vanganum, verður eitt talgilt umsóknarblað, og seinni verða eisini onnur oyðubløð og aðrar tænastur tøkar á Vanganum.

Hetta fer vónandi at gera avgreiðslurnar enn tryggari og ómaksleysari, og vónandi fara viðskiftafólkini at merkja, at tænasturnar verða enn betri.

Í hesum sambandi hevur løgtingið samtykt lógarbroyting, sum heimilar landsstýrismanninum at áseta nærri reglur um, at upplýsingar skulu skrásetast og sendast Arbeiðsloysisskipanini elektroniskt.

## Nýggj skjalaskrá

Í sambandi við at veitarin av verandi skjalaskrá ikki longur mennir og viðlíkaheldur skjalaskránna, er gjørt av at keypa nýggja skjalaskrá. Valið fall á føroysktmentu skjalaskránna hjá Nema – NemaJournal – sum lýkur tørvin hjá ALS, og sum eisini stuðlar undir ásetingarnar í nýggju dátuverndarlógini.

## Dátuverndarfólk

Í samsvari við ásetingarnar í løgtingslóg um vernd av persónupplýsingum hevur ALS sett dátuverndarfólk í starv. Talan er um fólk, sum var í øðrum starvi frammanundan, men sum við hesum fær nýggjar uppgávur, men sum í ávísan mun eisini varðveitir nakrar av uppgávunum, viðkomandi hevði frammanundan.

Viðkomandi er eisini dátuverndarfólk hjá Trygdargrunni Fiskimanna og hjá Fasta Gerðarrætti.



## Eftirløn av arbeiðsloysis-stuðli

Í sambandi við pensiónsnýskipanina, sum Føroya Løgting samtykti í apríl mánaði í 2018, er tað álagt ALS at rinda viðskiftafólkunum eftirløn av arbeiðsloysisstuðlinum. Eftirlønargjaldið var 5% frá 1. januar 2019, og síðani hækkar tað við einum prosentstigi árliga fram til 1. januar 2026, tá eftirlønin er komin upp á 12%.

Eftirlønargjaldið var 6% frá 1. januar 2020 og hækkaði upp á 7% 1. januar 2021.

Í 2020 rindaði ALS samanlagt 5,4 mió. krónur út í eftirlønum av arbeiðsloysisstuðli umframt 7,0 mió. krónur í eftirlønum av lønarísktoyum, ið vóru goldin út í serligu korona-skipanini, hjálparpakka 1.

Við lógarbroyting, sum var samtykt í desember mánaði 2020, staðfesti Løgtingið heimildina hjá ALS at rinda eftirløn aftur at arbeiðsloysisstuðlinum

## Ársfundurin

Í mai mánaði í 2013 var fyrsti ársfundurin eftir ein steðg síðani miðskeiðis í nítiárunum hildin.

Ársfundurin er at meta sum eitt slag av aðalfundi, har tey, ið varða av Arbeiðsloysisskipanini, hava høvið at kunna seg um virksemið, um støðuna og um útlitini fyri framtíðina.

Ætlanin var, at ársfundurin skuldi vera 15. mai í 2020, men orsakað av vandunum við koronasmittuni var gjørt av at avlýsa ársfundin í fjør, og tað er avgjørt, at ársfundurin í ár verður eisini avlýstur.

Ætlanin er at halda ársfund aftur komandi ár.



*Lógarásetta ALS-gjaldið lækkaði 1. januar 2021 úr 1,25% niður í 1,0%*

## Lógarbroytingar

Tað hevur leingi verið ósamsvar millum galdandi avtalur, sum Føroyar hava við hini norðurlendsku londini og føroyska lóggávu.

Eitt dømi um hetta er norðurlendska avtalan um almannatrygd. Í mun til arbeiðsloysistrygging er meginreglan í hesi avtalu, at norðurlendingar, sum arbeiða í øðrum Norðurlandi, skulu verða arbeiðsloysistryggjaðir í landinum, teir arbeiða.

Føroyar og Noreg hava eina sínámillum avtalu, sum loyvir undantøku frá meginregluni í norðurlendsku avtaluni soleiðis, at norðmenn og føroyingar kunnu velja at vera arbeiðsloysistryggjaðir í landinum, teir búgva – heldur enn í landinum, teir arbeiða.

Hetta hevur havt trupulleikar við sær, tí ALS hevur ikki havt heimild at taka móti ALS-gjaldi av øðrum enn a-inntøkum. Harvið eru tað bert persónar við a-inntøku, sum kunnu hava verið arbeiðsloysistryggjaðir í Føroyum.

Føroyingar, sum arbeiða í Noreg hava ikki a-inntøku, men b-inntøku, og hesir hava tí ikki kunna verið arbeiðsloysistryggjaðir í Føroyum uttan so, at teir hava teknað eina sjálvbodna arbeiðsloysistrygging fyri løntakarar.

Ósamsvarið millum hesa avtalu og føroysku lóggávuna var rættað, tá løgtingið 10. desember 2020 samtykti broytingar í ALS-lógini, sum millum annað áseta, at ALS-gjald skal rindast av øllum lønarinntøkum fyri arbeiði útint í Føroyum og av lønarinntøkum, sum ikki eru a-inntøkur fyri arbeiði útint í Norðurlandi, og sum sambært ásetingunum í millumtjóðasáttmála eru almannatryggjað í Føroyum.

Við hesum broytingum ber nú til hjá føroyingum, sum arbeiða í Noreg, at vera arbeiðsloysistryggjaðir í Føroyum eftir vanligu arbeiðsloysisskipanini.

ALS-gjaldið var eisini broytt við lógarbroytingunum í desember mánaði. ALS-gjaldið, sum síðani 1. januar 2012 hevur verið 1,25%, var við lógarbroytingini lækkað niður í 1%.

Lækkingin hevur við sær, at samlaðu inngjøldini hjá ALS minka við 50-55 mió. krónum og verða væntandi á leið 200 mió. krónur í 2021.

Eisini útgjaldsviðurskifti vóru broytt við hesi lógarbroytingini. Útgjaldshámarkið, sum síðani 2012 hevur verið 210.000 krónur árliga, og sum svarar til 17.500 krónur um mánaðin, er hækkað upp í 222.000 krónur árliga. Tað svarar til 18.500 krónur um mánaðin.

Eisini útgjaldsprosentið er hækkað – úr 75% av inntøkuni seinastu 12 mánaðirnar upp í 80% av inntøkuni.

Broytingarnar í útgjaldsviðurskiftunum fara væntandi at hava við sær, at samlaðu útgjøldini verða á leið 10% hægri, enn tey høvdu verið, høvdu broytingarnar ikki verið gjørdar.

Eitt endamál við hesum broytingunum er at taka hædd fyri príshækkingum, og at kostnaðarstøðið hækkar.

Við lógarbroytingunum varð tvungna eftirlønargjaldið lagt aftur at arbeiðsloysisstuðlinum. Hendan broytingin var í roynd og veru longu framd 1. januar 2019, og hevur eftirlønargjald verið lagt oman á arbeiðsloysisstuðulin síðani tá.

Í framhaldi av lógarbroytingunum, sum vóru gjørdar í desember mánaði, eru stig tikin til at fara undir eina heildarendurskoðan av allari Arbeiðsloysisskipanini at tryggja, at hon á nøktandi hátt lýkur krøvini til eina dagførda, framkomna Arbeiðsloysisskipan, ið á bestan hátt røkkur endamálinum við skipanini.

## Fasti Gerðarrættur

Arbeiðsloysisskipanin hevur avtalu við Fasta Gerðarrætt at hýsa hesum stovni og at umsita ein part av hesi skipan. Fasti Gerðarrættur endurrindar Arbeiðsloysisskipanini fyri umsitingina, og í 2020 var samlaða upphæddin 66.600 krónur.

## Trygdargrunnur fiskivinnunar

Galdandi frá 1. juli 2011 hevur Arbeiðsloysisskipanin eisini avtalu við Trygdargrunn fiskivinnunar um, at tey halda til í hølunum hjá ALS.

Fyri samhýsingina rindaði Trygdargrunnurin ALS 960 tús. krónur í 2020.

Trý fólk starvast hjá Trygdargrunninum, men sambært samstarvsavtaluni millum ALS og Trygdargrunnin eru tvey teirra formliga í starvi hjá ALS, men starvast fyri Trygdargrunninum.

ALS rindar lønarkostnaðin av hesum starvsfólkum, men Trygdargrunnurin ber ALS allar útreiðslur av hesum aftur.

Samlaða upphæddin, sum Trygdargrunnurin bar ALS aftur fyri starvsfólkakostnaðir í 2020, var 1.728.606 krónur. Í upphæddini er samsýningin til stýrið fyri Trygdargrunnin við.

Samanlagt eru 2,4 ársverk hjá Trygdargrunninum.

*Nú ber til hjá føroyingum, sum arbeiða í Noreg, at vera arbeiðsloysistryggjaðir í Føroyum eftir vanligu arbeiðsloysisskipanini*

## Stýrið

Sambært løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing frá 13. juni 1997, við seinni broytingum, verður stýrið fyri Arbeiðsloysisskipanina valt fyri fýra ár í senn.

Stýrið, sum situr nú, tók við 1. oktober 2017, og stýrið skal tí veljast av nýggjum at taka við 1. oktober 2021.

**Í stýrinum sita:**

Eyðfinnur Jacobsen, formaður
Georg F. Hansen
Jan Mortensen
Magnus Pauli Glerfoss
Marita Rasmussen
Óluva í Gong
Stefan í Skorini.

Landsstýrismaðurin við umhvørvis- og vinnumálum velur eftir tilráðing frá løntakarafeløgum og arbeiðsgevarafeløgum tríggjar stýrislimir umboðandi løntakarafeløgini og tríggjar stýrislimir umboðandi arbeiðsgevarar. Harafturat velur landsstýrismaðurin eisini formann ella forkvinnu, sum verður valdur uttan tilráðing frá øðrum.



# BÚSKAPUR
# 2020

## Hóast ALS-gjaldið hevur verið óbroytt seinastu nýggju árini, hevur verið ein støðugur vøkstur í samlaðu inngjøldunum hjá ALS hesi árini

Í 2019 vóru samlaðu inngjøldini 245,2 mió. krónur, og í 2020 komu tey upp á 253,2 mió. krónur. Ein vøkstur á 8,0 mió. krónur svarandi til 3,3%.

Hetta er tað mesta, samlaðu inngjøldini hava verið, síðani skipanin var stovnað í 1992.

ALS-gjaldið hevur verið óbroytt seinastu níggju árini, og tí stavar vøksturin í samlaðu inngjøldunum frá, at samlaðu lønarútgjaldingarnar í Føroyum aftur hækkaðu í 2020 – hesaferð við 2,1% úr 10,1 mia. krónum upp í 10,3 mia. krónur. Hækkingin var 207,4 mió. krónur.

Myndin niðanfyri vísir gongdina í ALS-gjaldinum og samlaðu inngjøldunum, síðani Arbeiðsloysisskipanin varð stovnað í 1992. Gula strikan vísir ALS-gjaldið (%), meðan stabbarnir vísa samlaðu inngjøldini. **Sí mynd 14.**

**Mynd 14** / ALS-gjald og samlað inngjøld 1992 – 2020



# Korona ávirkaði útgjøldini skeiva vegin

Arbeiðsloysið hevur verið støðugt minkandi síðani ársbyrjan í 2011, tá tað var upp á tað mesta í nýggjari tíð.

Samlaðu útgjøldini eru neyvt knýtt at arbeiðsloysinum, og tí eru samlaðu útgjøldini eisini minkað støðugt hesi seinastu árini. Men serliga korona-skipanin gjørdi, at útgjøldini hækkaðu munandi í 2020.

Í 2020 vóru samlaðu útgjøldini 206,0, sum eru 154,8 mió. krónur meiri enn í 2019. Hetta svarar til stívliga eina fýrafaldan í mun til tað, tey vóru í 2019, tá tey vóru 51,2 mió. krónur.

Tað var serliga hjálparpakki 1, sum ávirkaði útgjaldið av arbeiðsloysisstuðli.

Samlaði kostnaðurin av hjálparpakka 1 var 147,76 mió. krónur. Av hesi upphædd rindaði ALS samanlagt 128,5 mió. krónur, meðan landið rindaði 19,3 mió. krónur.

Útgjaldið av vanligum arbeiðsloysisstuðli og stuðli úr fiskavirkisskipanini var 67,2 mió. krónur, sum var 25,1 mió. krónur meira enn undanfarna ár. Tá eru eftirlønir og arbeiðsmarknaðargjøld ikki tald við.

Vanligu útgjøldini hækkaðu við 67% úr 28,3 mió. krónum upp í 47,3 mió. krónur.

Útgjøldini um fiskavirkisskipanina hækkaðu við sløkum helmingi í 2020 - úr 13,8 mió. krónum upp í 19,9 mió. krónur – umframt eftirlønir og arbeiðsmarknaðargjøld. Ein hækking á 6,1 mió. krónur svarandi til sløk 45%. Ein týðandi orsøk til tað eru avleiðingarnar av korona-farsóttini.

Talið av fólkum, sum fingu útgjald um fiskavirkisskipanina í 2020, var í miðal 262 fólk. Tað var væl hægri enn árið frammanundan, tá talið var 177 fólk. Miðalupphæddin hvørt útgjaldsskeið var stórt sæð tann sama í 2020 sum í 2019 – á leið 3 tús. krónur.

Kostnaðirnir av starvsvenjingini hava verið støðugt minkandi síðani 2012, og í 2020 vóru teir komnir niður á 1,9 mió. krónur. Tað er 208 tús. krónur minni enn árið frammanundan, tá teir vóru 2,2 mió. krónur.

Peningaligi týdningurin fyri ALS av starvsvenjingini er avmarkaður, tí upphæddirnar, sum vera goldnar út í sambandi við starvsvenjingar, høvdu óansæð verið goldnar út sum vanligur arbeiðsloysisstuðul, hevði eingin starvsvenjing verið.

Upphæddirnar, ið hava verið brúktar til arbeiðsmarknaðarátøk og førleikamenning hjá viðskiftafólkunum, vóru vaksandi fram til 2014, men so hvørt sum arbeiðsloysið er minkað, er virksemið lagað til, og minni upphæddir eru eisini brúktar til hetta endamál. Upphæddin í 2019 var slakar 3,2 mió. krónur, meðan tað vóru brúktar stívliga 2,6 mió. krónur í 2020. Minkingin er á leið 570 tús. krónur.

Ein lutfalsliga stórur partur av samlaðu upphæddini verður brúktur til rakstur av Fjølsmiðjuni og tí virksemi, har er. **Sí mynd 15 og mynd 16.**

# Starvsfólkakostnaðir

Talið av starvsfólkum hevur verið minkandi seinnu árini og er farið úr 43 ársverkum í 2015 niður í 27 í 2020. Hetta er lægsta tal av starvsfólkum í níggju ár, og komandi ár verður talið av ársverkum væntandi á leið tað sama.

Minkandi arbeiðsloysi, nýggjar kt-loysnir, umskipingar og tillagingar eru høvuðsorsøkir til, at starvsfólkahópurin er minkaður seinastu árini.

Samlaðu starvsfólkaútreiðslurnar vóru 14,3 mió. krónur í 2019. Í 2020 vóru tær 16,5 mió. krónur. Orsøkin til stóra vøksturin er, at í sambandi við hjálparpakka 1 arbeiddu starvsfólkini sera nógv yvir fyri at tryggja øllum teimum næstan 5.000 fólkunum, sum komu í serligu korona-skipanina hjá ALS, lønarískoyti rættstundis.

**Mynd 15** / Samlað útgjøld 1992 - 2020




**Mynd 16** / Samlaðu útgjøldini eru býtt soleiðis seinastu árini

| Mió. krónur | 2020 | 2019 | 2018 | 2017 | 2016 | 2015 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Vanligur arbeiðsloysisstuðul | 47,3 | 28,3 | 45,4 | 57,1 | 71,5 | 92,2 |
| Fiskavirkisskipanin | 19,9 | 13,8 | 17,0 | 15,4 | 20,2 | 24,3 |
| Hjálparpakki 1 | 128,5 | - | - | - | - | - |
| Eftirlønir | 4,3 | 2,3 | - | - | - | - |
| Starvsvenjing | 1,9 | 2,2 | 3,3 | 3,7 | 5,8 | 7,5 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 1,4 | 0,9 | 1,3 | 1,5 | 1,9 | 2,3 |
| Førleikamenning og arbeiðsmarknaðarátøk | 2,6 | 3,2 | 4,2 | 4,2 | 4,8 | 6,5 |
| **Íalt** | **206,0** | **60,7** | **71,3** | **81,8** | **104,0** | **132,8** |

**Mynd 17** / Tal av ársverkum



# Rakstrarkostnaðir

Samlaðu rakstrarkostnaðirnir í 2020 vóru 4,0 mió. krónur. Tað er ein mió. krónur – 20% - minni enn árið frammanundan, tá tær vóru 5,0 mió. krónur. **Sí mynd 18.**

Harvið ber til at staðfesta, at vanligu rakstrarkostnaðirnir nú eru teir lægstu í 25 ár - síðani 1995. Tá er hædd ikki tikin fyri prísvøkstri og broyttum roknskaparligum meginreglum.

Við í rakstarkostnaðunum eru bæði inntøkur og útreiðslur av Losjuni, sum ALS keypti á sumri í 2016.

Myndin niðanfyri vísir gongdina í samlaðu fyrisitingarútreiðslunum, avskrivingunum og mvg síðani 2004. Upphæddirnar eru í føstum 2004-prísum. **Sí mynd 19.**

Sum myndin vísir, so eru hesar útreiðslur minkaðar úr 13,6 mió. krónum í 2010 niður í 4,5 mió. krónur í 2019. Hetta er ein minking á 9,1 mió. krónur – svarandi til stívliga 67% eftir tíggju árum.

Høvdu hesar útreiðslur verið óbroyttar hesi 10 árini, so høvdu tær samanlagt havt verið 52,2 mió. krónur hægri, enn tær hava verið.

Gongdin við munandi sparingum seinnu árini er úrslit av einum miðvísum arbeiði at fáa meiri fyri minni og spara allastaðni, har tað loysir seg og gevur meining. Miðað verður eftir, at hesar útreiðslur komandi árini vera á sama stigi, og málið er, at ALS framhaldandi verður rikið á skynsaman hátt.

Verður kostnaðurin av at reka føroysku Arbeiðsloysisskipanina borin saman við kostnaðin av at reka donsku a-kassarnar, so vísir tað seg, at tað er væl bíligari at reka ALS samanborið við danskar a-kassar.

Tað kostar í miðal 65 krónur um mánaðin fyri hvønn løntakara – sum allir eru limir í ALS – at reka ALS. Til samanberingar kostar tað 83 krónur fyri hvønn lim at reka bíligasta danska a-kassan, sum er DSA, og sum hevur slakar 96 tús. limir.

Tann danski a-kassin, sum hevur á leið sama limatal sum ALS, er Teknisk Landsforbund, sum 1. januar 2021 hevði 23.529 limir. Hjá teimum kostaði tað 146 krónur fyri hvønn limin at reka a-kassan. Tað er meiri enn tvífalt tað, tað kostar at reka ALS. **Sí mynd 20.**

**Mynd 18** / Samlaðir rakstrarkostnaðir 2004 – 2020 í ársins prísum




Tað er í hesum sambandi vert at hava í huga, at donsku a-kassarnir bert umsita útgjald av arbeiðsloysisstuðli, meðan arbeiðsávísing ikki er partur av virkseminum.

Føroyska Arbeiðsloysisskipanin umsitur bæði útgjald av arbeiðsloysisstuðli, umframt at arbeiðsávísing eisini er týðandi partur av virkseminum. Hevði tað í rakstrarútreiðslunum hjá ALS verið tikið hædd fyri hesum, hevði munurin á tí, tað kostar at reka ALS og danskar a-kassar, verið væl størri. **Sí mynd 18, 19 og 20.**

**Mynd 19** / Fyrisitingarútreiðslur, avskrivingar og mvg í føstum 2004-prísum




**Mynd 20** /Kostnaður til fyrisiting, kr/lim - samanbering við danskar a-kassar



# Úrslit og eginogn

Árúrslit 2020

**37,1** mió. kr.

2019: 200 mió. kr.

Úrslitið fyri avskrivingar og fíggjarpostar var eitt avlop á 26,0 mió. krónur. Til samanberingar var hetta úrslitið eitt avlop á 174,9 mió. krónur í 2019.

Úrslitið er nógv ávirkað av hjálparpakka 1, har ALS rindaði føroyskum løntakarum 128,5 mió. krónur í lønarískoyti. Avskrivingarnar í 2020 vóru 323 tús. krónur, sum er slakar 96 tús. krónur meiri enn árið fyri. Orsøkin er, at Losjan varð avskrivað fyri fyrstu ferð í 2020.

Í 2014 vóru allar ognir burtursæð frá grundøkinum og bygninginum við Tinghúsvegin endaliga avskrivaðar, og tá øll keyp, sum frammanundan hava verið handfarin sum íløgur og avskrivað yvir fleiri ár, síðani hava verið útreiðsluførd yvir raksturin, so eru samlaðu avskrivingarnar minkaðar munandi samanborið við 2014. Í árunum, sum koma, verða tað bara bygningarnir við Tinghúsvegin – tað er ALS-bygningurin og Losjan - sum verða avskrivaðir.

Virðisbrævaognirnar vuksu úr 861,8 mió. krónum við árslok 2019 til 894,7 mió. krónur við árslok 2020.

Rentingin av fíggjarognunum var ikki so góð í 2020 sum árið frammanundan.

Í 2019 var rentingin +3,54%, meðan hon var +1,42% í 2020. Samlaðu fíggjarinntøkurnar vóru 12,4 mió. krónur í 2020 og 26,0 mió. krónur í 2019.

Í 2019 góvu partabrøvini eitt avkast á oman fyri 27%, meðan avkastið av lánsbrøvunum var 1,15%. Í 2020 var avkastið av partabrøvum sløk 7%, og avkastið av lánsbrøvum var 0,7%.

Útlitini vóru einki serlig í mars mánaði í 2020, tá korona-farsóttin herjaði um mest sum allan heim. Korona ávirkaði eisini fíggjarmarknaðirnar, og í februar og mars mánaði var missurin av virðisbrøvunum samanlagt oman fyri 47 mió. krónur, og tað vóru tíðarskeið, har missurin var enn størri. Tað var serliga av partabrøvum, at missurin var stórur, og fyrsta ársfjórðing var rentingin av partabrøvunum minus 21,4%.

ALS hevur ein varnan íløgupolitikk, har dentur verður lagdur á at varðveita fíggjarognirnar og at tryggja, at neyðugt gjaldføri altíð er tøkt, tá tørvur er á tí. Fyri at avmarka váðan mest møguligt verður størsti parturin tí settur í lánsbrøv. Ein minni partur – í mesta lagi 20% av samlaðu upphæddini, sum verður sett í virðisbrøv - verður settur í alheimspartabrøv.

Orsakað av korona-farsóttini gjørdist ársúrslitið ikki tað, sum roknað var við við ársbyrjan, men hóast korona, so gjørdist úrslitið hóast alt eitt avlop á 37,1 mió. krónur í mun til 200 mió. krónur árið frammanundan.

Í 2020 hækkaði tøki peningurin við 9,2 mió. krónum úr 7,4 mió. krónum upp í 16,6 mió. krónur við árslok 2020.

Avlopsgjaldførið verður javnan sett í virðisbrøv, og negativa rentan, bankar taka fyri innistandandi, hevur við sær, at tað nú oftari verða gjørdar íløgur í virðisbrøv heldur enn at hava tøkan pening standandi á kontu í peningastovni.

Við ársbyrjan í 2020 var eginognin 911,0 mió. krónur, og við árslok var hon vaksin upp í 948,1 mió. krónur.

Tá eginognin frammanundan hesum var størst, tað var í august mánaði í 2009, var hon stívliga 742 mió. krónur. Nú stívliga 10 ár seinni ber til at staðfesta, at eginognin nú er tann størsta, hon nakrantíð hevur verið í søguni hjá ALS.

*Úrslitið er nógv ávirkað av hjálparpakka 1, har ALS rindaði føroyskum løntakarum 128,5 mió. krónur í lønarískoyti.*

**Mynd 21** / Ársúrslit 1992 - 2020




**Mynd 22** / Eginogn 1992 – 2020




Væntandi fer eginognin upp um eina milliard krónur í 2021.

Gongdin hesi seinastu ellivu árini ella so vísir, at tað kann vera skjótt hvønn vegin, og at eginognin og harvið fíggjarligi mátturin hjá skipanini kann vikna skjótt. Tað vísir eisini týdningin av, at skipanin er í eini tryggari legu, so hon verður fíggjarliga haldfør nógv ár fram í tíðina.

Tað bar eisini bara til hjá ALS at taka á seg ábyrgdina av hjálparpakka 1, tí skipanin var so væl fyri fíggjarliga, sum hon var.

Í kjalarvørrinum av jaligu gongdini, sum hevur verið á arbeiðsmarknaðinum seinastu árini, eru broytingar gjørdar í Arbeiðsloysisskipanini, og skipanin er lagað til verandi umstøður. Lækkaða inngjaldið og hækkaða útgjaldið av arbeiðsloysisstuðli hava við sær, at samlaðu inngjøldini minka og samlaðu útgjøldini vaksa, men skipanin er nú so mikið væl fyri fíggjarliga, at hon tolir hesar tillagingar – eins og grunnurin eisini megnaði at átaka sær fyrisitingina og kostnaðin av hjálparpakka 1, sum var øllum føroyska samfelagnum at gagni.
**Sí mynd 21 og 22.**

## Útlit fyri 2021

Í skrivandi løtu eru stívliga 16 tús. føroyingar koppsettir fyri koronu, og bert heilt fá fólk hava verið staðfest smittað í Føroyum í fleiri mánaðir. Í flestu førum er talan um persónar, sum eru komnir til Føroyar úr útlondum.

Men hóast myndugleikarnir tykjast hava fingið bilbugt við korona-smittuna í Føroyum, so er støðan ikki so góð í øðrum londum. Marknaðirnir, sum vanliga keypa føroyska framleiðslu, eru enn ávirkaðir av koronu, og tað merkist eisini á føroyska útflutninginum, sum minkaði við meiri enn einari milliard krónum í 2020 samanborið við árið frammanundan.

Hóast neiligu ávirkanina av korona-farsóttini, og hóast útflutningurin minkaði, so var kortini nógv virksemi, og samlaðu lønargjaldingarnar vuksu nakað í 2020.

Vøksturin sær fyribils út til at halda fram í 2021, og fyrsta ársfjórðing í 2021 hækkaðu samlaðu lønargjaldingarnar nakað samanborið við sama tíðarskeið í 2020.

Orsakað av, at ALS-gjaldið lækkaði úr 1,25% niður í 1,0% frá 1. januar 2021, væntast samlaðu inngjøldini hjá ALS at verða 50-55 mió. krónur minni, enn tær høvdu verið, um ALS-gjaldið ikki var lækkað, og tær verða væntandi á leið 200 mió. krónur í 2021.

Um sama mundið sum inngjaldið var lækkað, var arbeiðs-loysisstuðulin hækkaður.

Útgjaldsloftið hækkaði úr 17.500 krónum um mánaðin upp í 18.500 krónur, eins og útgjaldsprosentið hækkaði úr 75% upp í 80%. Hesar broytingar fara væntandi at hava við sær, at samlaðu útgjøldini verða á leið 10% hægri, enn tey høvdu verið, høvdu broytingarnar ikki verið gjørdar.

Gjaldsskyldan varð eisini víðkað til at umfata aðra lønarinntøku enn bert a-inntøku, og so vóru aðrar smærri lógarbroytingar eisini gjørdar.

Hóast broytingarnar eru útlitini góð, og arbeiðsloysið væntast ikki at vaksa nógv í 2021, og úrslitið hjá ALS fer væntandi at verða eitt avlop á umleið 90 til 100 mió. krónur í 2021.

Arbeiðsloysisskipanin er væl fyri fíggjarliga, og megnar at lofta fíggjarligu avbjóðingunum av einum hægri arbeiðsloysi í nógv ár.

Við verandi eginogn megnar skipanin at standa ímóti einum arbeiðsloysi á 8% í eini 5 ár og einum arbeiðs-loysi á 12% í eini tvey til trý samanhangandi ár.

Seinast, arbeiðsloysið var 8%, var í 1997 – fyri skjótt 25 árum síðani.

Eftir at broytingar vóru gjørdar frá ársskiftinum, verður tað ikki mett at verða neyðugt við størri inntrivum ella broytingum í grundleggjandi fyritreytunum fyri grunninum. Men hóast tað, so verður øll skipanin endurskoðað í næstum.

*Við verandi eginogn megnar skipanin at standa ímóti einum arbeiðsloysi á 8% í eini 5 ár.*



Gjaldførið í 2020

**914** mió. kr.

2019: 871 mió. kr.

## Gongdin í virkseminum og fíggjarligu viður-skiftunum hjá skipanini

Rakstrarroknskapurin fyri tíðarskeiðið frá 1. januar 2020 til 31. desember 2020 vísir eitt avlop á 37.084.049 krónur móti einum avlopi á 199.694.094 krónur fyri tíðarskeiðið frá 1. januar 2019 til 31. desember 2019.

Stýrið og stjórn eru nøgd við úrslitið fyri 2020. Gjaldførið er gott, og tøkur peningur, áogn og lætt umsetilig virðisbrøv hjá Arbeiðsloysisskipanini vuksu í 2020 við 42,6 mió. krónum úr 871.629.627 krónum upp í 914.234.177 krónur.

# Hendingar eftir roknskaparlok

Einki er hent eftir árslok, sum ávirkar úrslitið fyri 2020 ella fíggjarstøðuna við árslok 2020.

Ársfrásøgnin hjá ALS fyri 2020 er gjørd í samsvari við ásetingarnar í ársroknskaparlógini fyri miðalstór feløg í bólki C við teimum tillagingum, sum stýrið hevur mett neyðugt, og eftir løgtingslóg nr. 113 frá 13. juni 1997 um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 43 frá 7. apríl 2020. Talan er um tvær tillagingar í mun til ársroknskaparlógina.



Tann fyrra tillagingin er, at aðrar materiellar ognir enn grundøki og bygningar verða ikki tiknar við sum ognir í fíggjarstøðuni. Tann seinna tillagingin er, at mettur framtíðarkostnaður viðvíkjandi arbeiðsloysisstuðuli til tey arbeiðsleysu, sum eru í skipanini verður ikki tikin við í fíggjarstøðuna, sum ein avsett skylda. Metta skyldan verður hinvegin upplýst sum ein eventualskylda í einari notu til ársroknskapin.

Tann nýtti roknskaparhátturin er óbroyttur í mun til síðsta ár.

### Um innrokning og virðisáseting

Inntøkur verða innroknaðar í rakstrarroknskapin, so hvørt sum tær verða vunnar. Harumframt verða virðisjavningar av fíggjarligum ognum og skyldum innroknaðar. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allir kostnaðir, íroknað avskrivingar og niðurskrivingar, innroknaðir.

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið í framtíðini fær fíggjarligar ágóðar, og virðið á ognini kann gerast upp álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið í framtíðini skal av við fíggjarligar ágóðar, og virðið á skylduni kann gerast upp álítandi. Til at byrja við verða ognir og skyldur innroknaðar til kostprís. Síðani verða ognir og skyldur virðisásettar, sum lýst niðanfyri fyri einstøku roknskaparpostarnar.

Ávísar fíggjarligar ognir og skyldur verða virðisásettar til amortiseraðan kostprís, og sostatt verður ein konstant effektiv renta innroknað yvir gildistíðina. Amortiseraður kostprísur verður uppgjørdur sum upprunaligur kostprísur við frádrátti av møguligum avdráttum og ískoyti/frádrátti av samlaðu amortiseringini av muninum millum kostprís og áljóðandi virði

Í sambandi við innrokning og virðisáseting verður hædd tikin fyri væntaðum tapum og vandum, sum íkoma áðrenn ársfrásøgnin verður løgd fram, og sum sanna ella avsanna viðurskifti, ið vóru til staðar fíggjarstøðudagin.



# ÁRSROKNSKAPUR


| | |
|---|---|
| Nýttur roknskaparháttur | 44 |
| Rakstrarroknskapur 1. januar - 31. desember 2020 | 47 |
| Fíggjarstøða tann 31. desember 2020 | 48 |
| Peningastreymsuppgerð 1. januar - 31. desember 2020 | 50 |
| Notur til ársfrásøgnina | 52 |




# Nýttur roknskaparháttur

Ársfrásøgnin hjá ALS fyri 2020 er gjørd í samsvari við ásetingarnar í ársroknskaparlógini fyri miðalstór feløg í bólki C við teimum tillagingum, sum stýrið hevur mett neyðugt, og eftir løgtingslóg nr. 113 frá 13. juni 1997 um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 43 frá 7. apríl 2020. Talan er um tvær tillagingar í mun til ársroknskaparlógina.

Tann fyrra tillagingin er, at aðrar materiellar ognir enn grundøki og bygningar verða ikki tiknar við sum ognir í fíggjarstøðuni. Tann seinna tillagingin er, at mettur framtíðarkostnaður viðvíkjandi arbeiðsloysisstuðuli til tey arbeiðsleysu, sum eru í skipanini verður ikki tikin við í fíggjarstøðuna, sum ein avsett skylda. Metta skyldan verður hinvegin upplýst sum ein eventualskylda í einari notu til ársroknskapin.

Tann nýtti roknskaparhátturin er óbroyttur í mun til síðsta ár.

## Um innrokning og virðisáseting

Inntøkur verða innroknaðar í rakstrarroknskapin, so hvørt sum tær verða vunnar. Harumframt verða virðisjavningar av fíggjarligum ognum og skyldum innroknaðar. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allir kostnaðir, íroknað avskrivingar og niðurskrivingar, innroknaðir.

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið í framtíðini fær fíggjarligar ágóðar, og virðið á ognini kann gerast upp álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið í framtíðini skal av við fíggjarligar ágóðar, og virðið á skylduni kann gerast upp álítandi.
Til at byrja við verða ognir og skyldur innroknaðar til kostprís. Síðani verða ognir og skyldur virðisásettar, sum lýst niðanfyri fyri einstøku roknskaparpostarnar.

Ávísar fíggjarligar ognir og skyldur verða virðisásettar til amortiseraðan kostprís, og sostatt verður ein konstant effektiv renta innroknað yvir gildistíðina. Amortiseraður kostprísur verður uppgjørdur sum upprunaligur kostprísur við frádrátti av møguligum avdráttum og ískoyti/frádrátti av samlaðu amortiseringini av muninum millum kostprís og áljóðandi virði

Í sambandi við innrokning og virðisáseting verður hædd tikin fyri væntaðum tapum og vandum, sum íkoma áðrenn ársfrásøgnin verður løgd fram, og sum sanna ella avsanna viðurskifti, ið vóru til staðar fíggjarstøðudagin.

.



# Rakstrarroknskapurin

## Inngjøld

Inngjøld frá arbeiðsgevarum og løntakarum verða innroknað í rakstrarroknskapin tá lønin sum ALS gjaldið verður roknað av, verður goldin. Inngjøld frá sjálvstøðugum vinnurekandi og sjálvboðin arbeiðsloysistrygging verða innroknað, tá trygging og váðaskifti er farið fram áðrenn árslok.

## Útgjøld og útreiðslur til arbeiðsleys

Útgjøld til vanligan arbeiðsloysisstuðul, til arbeiðsloysisstuðul umvegis fiskavirkisskipanina, og til útreiðslur til starvsvenjing verða innroknaði í rakstrarroknskapinum tá hesi eru útgoldin. Útgjøldini eru tíðargreinaði soleiðis, at tey útgjøld, ið ikki eru útgoldin áðrenn 31. desember, men eru upptjent í roknskaparárinum, eru tikin við sum skyldugur arbeiðsloysisstuðul undir skuld í fíggjarstøðuni við árslok í roknskaparárinum.

Útreiðslur til arbeiðsleys fevnir um rakstrarútreiðslur av Vakstrarhúsinum og Fjølsmiðjuni, umframt skeiðsútreiðslur til arbeiðsleys.

## Aðrir uttanhýsis kostnaðir

Aðrir uttanhýsis kostnaðir fevnir um kostnaðir til lýsingar, umsiting, høli, innbúgv, edv, viðlíkahald, tap uppá skuldarar v.m. Harumframt verða vanligar íløgur td. í rakstrartól og innbúgv útreiðsluførd, sum aðrir uttanhýsis kostnaðir.

## Starvsfólkakostnaður

Starvsfólkakostnaður fevnir um løn og samsýning umframt lønartengdar kostnaðir.

## Av og niðurskrivingar

Av og niðurskrivingar fevna um ársins av og niðurskrivingar upp á materiella støðisogn.

## Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir

Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir verða innroknað í rakstrarroknskapin við teirri upphædd, sum viðvíkur roknskaparárinum. Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir fevna um rentur, kursvinning og –tap viðvíkjandi virðisbrøvum og vinningsbýti.

## Skattur av ársúrslitinum

Skattur og avgjøld fevnir um meirvirðisgjald, ið stavar frá keypi av vørum og tænastum.

Sambært løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum er Arbeiðsloysisskipanin undantikin skattskyldu.

# Fíggjarstøðan

### Materiell støðisogn

Materiell støðisogn verður virðisásett til kostprís við frádrátti av samlaðum av og niðurskrivingum.

Avskrivingargrundarlagið er kostprísur við frádrátti av væntaðum restvirði eftir lokna nýtslutíð. Grundøki verða ikki avskrivað.

Kostprísur er útveganarprísur umframt kostnaðir, ið beinleiðis eru knýttir at útveganini til dagin, tá ið ognin er klár at taka í nýtslu. Fyri egnar framleiddar ognir fevnir kostprísurin um beinleiðis og óbeinleiðis kostnaðir til tilfar, deilir, undirútvegarar og løn.

Kostprísurin á eini ogn verður býttur sundur í serstakar partar, ið verða avskrivaðir hvør sær, um nýtslutíðin er ymisk fyri ymsu partarnar.

Avskrivingin er eins stór fyri tey einstøku roknskaparárini og er grundað á hesar metingar um nýtslutíðina á ognunum:

| | Brúkstíð | Restvirði |
|---|---|---|
| Aðrir bygningar | 50 ár | 32 % |

Vinningur ella tap verða innroknað í rakstrarroknskapin undir ávikavist aðrar rakstrarinntøkur ella aðrar rakstrar-kostnaðir.

### Onnur virðisbrøv og kapitalpartar, støðisogn

Kapitalpartar verða virðisásettir til dagsvirði.

### Áogn

Áogn verður virðisásett til amortiseraðan kostprís, sum vanliga svarar til áljóðandi virði, við frádrátti av væntaðum tapum.

### Virðisbrøv og kapitalpartar

Virðisbrøv og kapitalpartar, ið eru innroknað undir ogn í umferð, verða virðisásett til dagsvirði (børskursin) við roknskaparlok. Dagsvirðið verður ásett út frá seinast skrásetta sølukursinum.

### Skyldur

Onnur skuld verður virðisásett til amortiseraðan kostprís, sum vanliga svarar til áljóðandi virði.

# Peningastreymsuppgerð

Peningastreymsuppgerðin vísir peningastreymar grunsins í árinum býtt á økini rakstrarvirksemi, íløguvirksemi og fíggjarvirksemi og broytingar í tøkum peningi í árinum umframt tøka pening grunsins við ársbyrjan og ársenda.

### Peningastreymur frá rakstrarvirksemi

Peningastreymurin frá rakstrarvirkseminum verður uppgjørdur sum ársins úrslit javnað fyri ikki kontantar rakstrarupphæddir og broytingar í arbeiðskapitali. Arbeiðskapitalurin fevnir um ogn í umferð frádrigið stuttfreistaða skuld og tær upphæddir, sum eru partur av tøka peninginum.

### Peningastreymur frá íløguvirksemi

Peningastreymurin frá íløguvirkseminum fevnir um gjøld í sambandi við keyp ella sølu av feløgum og virksemi umframt keyp ella sølu av immateriellari, materiellari og fíggjarligari støðisogn

### Peningastreymur frá fíggingarvirksemi

Peningastreymurin frá fíggjarvirkseminum fevnir um broytingar í støðd ella samanseting av stovnsfæi grunsins og kostnaðum knýttir at hesum umframt upptøku av lánum og gjaldan av avdráttum.

### Tøkur peningur

Tøkur peningur fevnir um tøkar peningaupphæddir og stuttfreistað virðisbrøv, sum uttan forðing kunnu umbýtast til tøkan pening, og har vandin fyri virðisbroytingum er uttan týdning.

### Yvirlit yvir høvuðs og lyklatøl

Frágreiðing til lykatølini.

**Høvuðsavkast** $\frac{\text{Úrslit áðrenn fíggjarpostar x 100}}{\text{Ognir til samans}}$

**Tryggleikastig** $\frac{\text{Eginogn ultimo x 100}}{\text{Ognir til samans við árslok}}$

**Eginpeningsavkast** $\frac{\text{Vanlig úrslit eftir skatt x 100}}{\text{Miðal eginogn}}$



# Rakstrarroknskapur 1. januar - 31. desember 2020

| | Nota | 2020 kr. | 2019 kr. |
|---|---|---|---|
| Inngjøld | | 253.154.545 | 245.150.604 |
| Útgjøld og útreiðslur til Hjálparpakka 1 | | 128.495.709 | 0 |
| Útgjøld og útreiðslur til arbeiðsleys | | 77.521.637 | 51.243.863 |
| Aðrir uttanhýsis kostnaðir | | 4.337.034 | 4.396.506 |
| **Bruttoúrslit** | | **42.800.165** | **189.510.235** |
| Starvsfólkakostnaður | 1 | 16.508.113 | 14.342.274 |
| Av og niðurskrivingar | | 323.476 | 227.682 |
| **Úrslit áðrenn fíggjarpostar** | | **25.968.576** | **174.940.279** |
| Fíggjarligar inntøkur | | 12.522.046 | 26.064.577 |
| Fíggjarligir kostnaðir | | 416.832 | 0 |
| **Úrslit áðrenn skatt** | | **38.073.790** | **201.004.856** |
| Skattur av ársúrslitinum | | 989.741 | 1.310.762 |
| **Ársúrslit** | | **37.084.049** | **199.694.094** |
| **Yvirskotsbýti** | | | |
| Flutt úrslit | | 37.084.049 | 199.694.094 |
| | | **37.084.049** | **199.694.094** |

# Fíggjarstøða tann 31. desember 2020

| | Nota | 2020 | 2019 |
|---|---|---|---|
| **OGN** | | kr. | kr. |
| Grundøki og bygningar | | 34.687.862 | 34.936.533 |
| Rakstrartól, innbúgv og onnur støðisogn | | 3 | 3 |
| **Materiell støðisogn** | **2** | **34.687.865** | **34.936.536** |
| | | | |
| Onnur virðisbrøv og kapitalpartar | 3 | 10.085.482 | 10.085.482 |
| **Fíggjarlig støðisogn** | | **10.085.482** | **10.085.482** |
| | | | |
| **Støðisogn til samans** | | **44.773.347** | **45.022.018** |
| | | | |
| Áogn av sølu og tænastum | | 13.015.971 | 12.416.629 |
| Onnur áogn | | 12.750 | 12.750 |
| **Áogn** | | **13.028.721** | **12.429.379** |
| | | | |
| **Virðisbrøv** | **4** | **884.577.010** | **851.753.623** |
| **Virðisbrøv** | | **884.577.010** | **851.753.623** |
| | | | |
| **Tøkur peningur** | | **16.628.446** | **7.446.625** |
| | | | |
| **Ogn í umferð til samans** | | **914.234.177** | **871.629.627** |
| | | | |
| **Ogn til samans** | | **959.007.524** | **916.651.645** |



# Fíggjarstøða tann 31. desember 2020

| | Nota | 2020 | 2019 |
|---|---|---|---|
| **SKYLDUR** | | kr. | kr. |
| Stovnsfæ | | 93.840.006 | 93.840.006 |
| Fluttur vinningur | | 854.211.850 | 817.127.801 |
| **Eginogn** | **5** | **948.051.856** | **910.967.807** |
| | | | |
| Vøru og tænastuskuld | | 1.322.739 | 997.278 |
| Onnur skuld | | 9.632.929 | 4.686.560 |
| **Stuttfreistað skuld** | | **10.955.668** | **5.683.838** |
| | | | |
| **Skuld til samans** | | **10.955.669** | **5.683.838** |
| | | | |
| **Skyldur til samans** | | **959.007.524** | **916.651.645** |
| | | | |
| Eventualskyldur v.m. | 6 | | |

# Peningastreymsuppgerð
# 1. januar - 31. desember 2020

| | Nota | 2020 | 2019 |
|---|---|---|---|
| | | kr. | kr. |
| Ársúrslit | | 37.084.049 | 199.694.094 |
| Javningar | | 323.476 | 227.682 |
| Broyting í rakstrarkapitali | | 4.672.487 | 949.764 |
| **Peningastreymur frá rakstri áðrenn fíggjarpostar** | | **42.080.012** | **198.972.012** |
| | | | |
| **Peningastreymur frá rakstrarvirksemi** | | **42.080.012** | **198.972.012** |
| | | | |
| Keyp av materiellari støðisogn | | 74.806 | 1.163.592 |
| Keyp av fíggjarligari støðisogn v.m. | | 0 | 10.085.482 |
| **Peningastreymur frá íløguvirksemi** | | **74.806** | **11.249.074** |
| | | | |
| **Broyting í tøkum peningi** | | **42.005.206** | **187.722.938** |
| | | | |
| Tøkur peningur | | 7.446.625 | 22.637.007 |
| Virðisbrøv | | 851.753.623 | 648.840.303 |
| Tøkur peningur 1. januar 2020 | | 859.200.248 | 671.477.310 |
| **Tøkur peningur 31. desember 2020** | | **901.205.454** | **859.200.248** |
| | | | |
| Tøkur peningur kann sundurgreinast soleiðis: | | | |
| Tøkur peningur | | 16.628.446 | 7.446.625 |
| Virðisbrøv | | 884.577.007 | 851.753.623 |
| **Tøkur peningur 31. desember 2020** | | **901.205.453** | **859.200.248** |



# Notur til ársfrásøgnina

| 1 | Starvsfólkakostnaður | 2020 kr. | 2019 kr. |
|---|---|---|---|
| | Lønir | 13.779.402 | 12.090.885 |
| | Eftirlønartryggingar | 1.811.262 | 1.470.257 |
| | Onnur lønartengd gjøld | 783.846 | 655.904 |
| | Annar starvsfólkakostnaður | 133.603 | 125.228 |
| | | **16.508.113** | **14.342.274** |
| | **Av hesum er samsýning til nevnd:** | | |
| | Stjórn og stýrið | 1.291.286 | 1.178.492 |
| | | **1.291.286** | **1.178.492** |
| Starvsfólkatal í miðal | | 27 | 29 |

Umframt starvsfólkaútreiðslurnar omanfyri er starvsfólkakostnaður eisini innroknaður, sum partur av útreiðslum til arbeiðsleys. Hesin kostnaður er í sambandi við Fjølsmiðjuna og var fyri 2020 til samans 1.777 tkr. í mun til 1.947 tkr. í 2019.

| 2 | MATERIELL STØÐISOGN | |
|---|---|---|
| | **Grundøki og bygningar** | |
| | Keypsvirði 1. januar 2020 | 37.729.554 |
| | Tilgongd í árinum | 74.806 |
| | Keypsvirði | 37.804.360 |
| | | |
| | Av- og niðurskrivingar 1. januar 2020 | 2.793.022 |
| | Avskrivingar í árinum | 323.476 |
| | Av- og niðurskrivingar | 3.116.498 |
| | Roknskaparligt virði 31. desember 2020 | 34.687.862 |
| | **Roknskaparligt virði 31. desember 2019** | **34.936.536** |

| 3 | FÍGGJARLIG STØÐISOGN | |
|---|---|---|
| | **Onnur virðisbrøv** | |
| | Útveganarvirði 1. januar 2020 | 10.085.482 |
| | Útveganarvirði | 10.085.482 |
| | Niður- og avskrivingar 1. januar 2020 | 0 |
| | Niður- og avskrivingar | 0 |
| | **Roknskaparligt virði 31. desember 2020** | **10.085.482** |

| 4 | VIRÐISBRØV | 2020 kr. | 2019 kr. |
|---|---|---|---|
| | Lánsbrøv Føroya Landstýri | 9.617.800 | 17.268.840 |
| | Onnur virðisbrøv | 874.959.210 | 834.484.783 |
| | | **884.577.010** | **851.753.623** |

| 5 | EGINOGN | Stovnsfæ | Fluttur vinningur | Til samans |
|---|---|---|---|---|
| | Salda við ársbyrjan 1. januar 2020 | 93.840.006 | 817.127.801 | 910.967.807 |
| | Ársúrslit | 0 | 37.084.049 | 37.084.049 |
| | **Eginogn** | **93.840.006** | **854.211.850** | **948.051.856** |

**6 EVENTUALSKYLDUR V.M.**

Við árslok 2020 vóru 339 fólk, sum høvdu rætt til arbeiðsloysisstuðul. Um øll hesi verða fulltíðararbeiðsleys, til tey hava brúkt allar eftirverandi dagar við rætti til arbeiðsloysisstuðul, so verður samlaði kostnaðurin hjá ALS av hesum umleið 148,8 mió. kr. í 2021, 2022 og 2023.

**Aðrar eventualskyldur**

Grunnurin hevur ein leigusáttmála, har leiguskyldan í uppsagnartíðini er 39 tkr.

**7 NÆRSTANDANDI PARTAR**

Føroya Landstýri velur stýrið fyri ALS.

ALS hevur avtalu við Trygdargrunn Fiskivinnunar um, at ALS hevur um hendi alla umsiting av virksemi Trygdargrunni Fiskivinnunar.

ALS

**ALS**
Tinghúsvegur 14

Tel 34 95 50
als@als.fo
www.als.fo